


Boðað verður við hesum til eykaaðalfundar í Eik Banka P/F **leygardagin 28. februar 2009, kl. 15.30** í høvuðssætinum hjá Eik, Yviri við Strond 2, Tórshavn

**Dagsskrá**
1. Uppskot til viðtøkubroytingar og broytingar í valreglunum
2. Heimild til nevndina at upptaka lán (hybridan kjarnkapital) sambært "Lov om statsligt kapitalindskud i kreditinstitutter"
3. Ymiskt

**Dagsskrá við fullfíggjaðum uppskotum**
Dagsskrá við fullfíggjaðum uppskotum fara at liggja frammi í høvuðssæti bankans Yviri við Strond 2, Tórshavn í seinasta lagi 8 dagar áðrenn eykaaðalfundin.

**Partapeningur og atkvøðurættur**
Partapeningur felagsins er kr. 812.927.400 lutaður sundur í 8.129.274 partabrøv.

Umboðsráðið útinnir atkvøðurættin hjá partaeigarunum á aðalfundinum.

Partaeigarar hava við at vísa atgongdarkort atgongd til aðalfundin, har teir hava talurætt, men ikki atkvøðurætt.

**Bílegging av atgongdarkortum**
Atgongdarkort verða útflýggjað teimum partaeigarum, sum í seinasta lagi mánadagin 23. februar 2009 hava bílagt umvegis heimasíðu okkara www.eik.fo ella biðið stjórnarskrivstovuna um hetta umvegis teldupost til: stj.skr@eik.fo ella á telefon 348571 og 348565.

**Kontuførandi peningastovnur**
Eik Banki P/F er partabrævaútgevandi peningastovnur í sambandi við partabrøv felagsins. Partaeigarar kunnu sostatt útinna síni fíggjarligu rættindi við at venda sær til Eik Banka P/F ella egnan kontuførandi peningastovn.

Eik Banki P/F

Nevndin

www.eik.fo





# Størv á Suðuroyar Sjúkrahúsi

**Sjúkrarøktarfrøðingar**
- Fast starv á sjúklingadeildini við 0,7 arbeiðstíð í skiftandi vaktum frá 1. mars 2009.
- Fast starv á sjúklingadeildini við 0,5 arbeiðstíð í skiftandi vaktum frá 1. apríl 2009.
- Fast starv á anæstesideildini við 1,0 arbeiðstíð við tilkallivakt frá 16. mars 2009.

**Bioanalytikarar**
- Farloyvisstarv við 0,5 arbeiðstíð frá 1. maj 2009 til 30. apríl 2010.

**Summarfrítíðaravloysarar**
- sjúkrarøktarfrøðingar til sjúklingadeildina í skiftandi vaktum frá 1. juni til 30. septembur 2009
- sjúkrarøktarfrøðingar til skurð/ røntgendeildina við tilkallivakt frá 1. mai til 31. august 2009
- sjúkrarøktarfrøðingar til anæstesideildina við tilkallivakt frá 1. juni til 31. august 2009
- portørar við tilkallivakt frá 1. juni til 31. august 2009
- starvsfólk til telefonvekslaran/ leiðbeiningina frá 1. juli til 31. august 2009.

Løn og setanartreytir sambært avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi størvunum fáast við at venda sær til:
**Thyru Thorsteinsson** fyristøðukvinnu lokal 3215
**Sannu Mortensen** leiðandi bioanalytikara lokal 3270
**Birgir Dimon** portør lokal 3230
**Pavlu Michelsen** telefonpassara lokal 3301.

Skrivlig umsókn við CV, avriti av prógvum og øðrum viðkomandi skjølum skal sendast til:

Suðuroyar Sjúkrahús
att. umsjónarmaðurin
Sjúkrahúsbrekkan 19
800 Tvøroyri

ella
ssh@ssh.fo
Umsóknarfreist: 1. mars 2009.

**Suðuroyar Sjúkrahús**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: 34 33 00 · Fax: 37 11 42
E-mail: ssh@ssh.fo





TILTAK FYRI ÚTFLUTNINGSVINNUNA

# Fá tað besta burtur úr messuni

At sýna fram á stevnum er eins og onnur marknaðarføringsátøk ein íløga. Sjálvsagt skal luttøka á stevnum vera lønandi eins og aðrar íløgur. 25. februar fær tín fyritøka møguleika fyri at fáa vitan, hugskot, íblástur og dømi um, hvussu tit kunnu betra tykkara úrslit, tá ið tit taka lut á stevnum.

Mikael Jansson, er ein tann mest vitandi fyrilestrarhaldarin í Evropa um evnið. Í fleiri enn 20 ár hevur hann gjørt kanningar og ráðgivið størri og minni fyritøkum um, hvussu tær kunnu fáa eitt betri úrslit, tá ið tær taka lut á stevnum.

Tiltakið er ætlað útflutningsvinnuni. SamVit skipar fyri.

| | |
|---|---|
| **Nær:** | Mikudagin 25. februar klokkan 11-16 |
| **Hvar:** | Norðurlandahúsið |
| **Kostnaður:** | 500 krónur pr. persón, íroknað prísin er ein løtt máltíð |
| **Tilmelding:** | Umvegis t-post til samvit@samvit.fo ella á tel. 306900 |
| **Tilmeldingarfreist:** | Mánadagin 23. februar |
| **Tilfar:** | Allir luttakarar fáa bókina "The Exhibition Guru" eftir Mikael Jansson |



**MIKAEL JANSSON**
Hann er stjóri og partaeigari í Scandinavian Survey Group. Hann stendur eisini á odda fyri the Exhibition Guru training project, sum hvørt ár mennir yvir 4.000 fólk. Til dømis hevur hann ráðgivið Ericsson, Saab Defence Industry og Wärtsilä.

**THE EXHIBITION GURU**
Kenda bókin hevur undirheitið "The Art of Exhibiting at Trade Shows and How to Make Money From It". Mikael Jansson hevur skrivað bókina.

sansir.fo

SamVit

Bryggjubakki 12 · P.O.Box 118 · 110 Tórshavn · Tel. 30 69 00 · Fax. 30 69 01 · www.samvit.fo